# Flatrate úr 269 kr.

Handan nýggja navnið, flatrate.fo, stendur felagið I-concept, sum í gott ár hevur verið á føroyska fjarskiftismarknaðinum. Tá Eyðstein Johannesen saman við øðrum fór undir virksemið í november í fjør, var IP-telefoni fyrsti marknaðurin, sum farið varð eftir, men fyritøkan er vaksin støðugt síðani. Breiðbandshald til bæði privat- og vinnukundar hevur eisini verið partur av úrvalinum, og tann partin eru tey nú í ferð við at seta nógv meira ferð á.

- Vit hava gjørt avtalu við FT-net, soleiðis at vit eisini eru á kaðalunum hjá teimum. Tað merkir, at vit nú kunnu bjóða internet til alt landið. Tráðleysa netverkið hjá okkum verður ikki tøkt um alt landið, tí hetta vil altíð vera ein spurningur um, hvar tað loysir seg at seta antennur upp, sigur Eyðstein Johannesen.

Í dag starvast fýra fólk í fulltíðarstarvi umframt eitt í parttíðarstarvi á I-Concept, og í januar mánaði verður hetta víðkað við tveimum sølufólkum.

- Tá hesi eru byrjað, verður farið enn meira miðvíst til verka. Í prísi eru vit fult og heilt kappingarfør við aðrar veitarar, og vónandi eydnast okkum at fáa okkara fasta part av marknaðinum. Ikki minst, tá nýggja ADSL+2 sambandið kemur, sigur Eyðstein.





















